**Próvtøka og góðkenning av SCUBA-kavarum.**
Próvtøkan umfatar verkliga kavararoynd, kavaraástøðisroynd (skrivlig roynd) og kavaraútgerð og trygd (munnliga roynd).
Fyri at sleppa til kavaraástøðisroynd og roynd í kavaraútgerð og trygd, skal umsøkjarin í minsta lagi hava fingið próvtalið 2 fyri kaving í verki, givið av tí lærara, sum hevur fyrireikað viðkomandi, eins og at umsøkjarin skal hava fylgt tí skipaðu undirvísingini.

Próvdøming av ávikavist roynd í kavaraástøði, kavaraútgerð og trygd, verður gjørd av tí lærara, sum hevur givið frálæru í viðkomandi lærugreinini, og einum próvdómara, ið er ein av limunum í próvtøku- og góðkenningarnevndini.
Próvdómari til hesa royndina var Heri Mørkøre, sum Próvtøkunevndin hevur góðkent.



*Mynd: Karl Joensen*

*Tillukku við próvnum*

Til próvdømingina verður 7 tals stigin brúktur, og fyri at standa próvtøku krevst, at einki próvtal er undir 2.



**Vinnubræv.**
Arbeiðseftirlitið útskrivar vinnubrævið grunda á prógv frá skúlanum. Vinnubrøv skulu endurnýggjast annað hvørt ár, sambært kunngerð um læknakanning av vinnukavarum.
Vinnubrævið er galdandi til vinnuligt kavaraarbeiði á landleiðini, á føroyskum sjóøki og frá føroyskum skipum.

**Hesir næmingarnir hava verið á skeið hjá Faroe Dive.**
**Allir næmingarnir stóðu royndina.**

# SCUBA-KAVARAR

Arbeiðseftirlitið
Juli 2010